## Ríkið hevur annan leiklut

POLITIKKUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Ríkisumboðið í Føroyum er sjáldan til staðar á løgtingsfundinum, hóast umboðið hevur rætt at vera har.

Tað vísir uppgerðin yvir uppmøting, sum er gjørd við grundarlagi í gerabókini hjá løgtinginum.

Birgit Kleis var í seinna hálvári í fjør til 14 av 38 løgtingsfund, og í hinum 24 førunum var einki at síggja til umboðið hjá ríkinum í Føroyum.

Fyri 30 og 40 árum síðani spældi ríkisumboðið í Føroyum ein nógv meira virknan leiklut í umsitingini av føroyska samfelagnum, og tað hoyrdist eisini aftur á løgtingi, har til dømis Mogens Vahl í heilum var við í viðgerðini av ymsum málum.

Men síðani vælferðarøkini eru yvirtikin og blokkstuðulin varð veruleiki, er leikluturin hjá ríkisumboðnum broyttur. Nú snýr tað seg mest um at fylgja við í tí, sum hendir í føroyska samfelagnum, og rapportera tað heim til myndugleikarnar í Danmark.

Hetta sæst tí eisini aftur í, hvussu virkið ríkisumboðið er í løgtinginum, tí síðsta hálva árið var Birgit Kleis bert til ein triðing av teimum 38 tingfundunum.

## Útsettur fundur mikukvøldið

Fyrsti veruligi fundurin hjá nýggja býráðnum í Klaksvík verður mikukvøldið kl. 18.00. Fundurin skuldi vera í síðstu viku, men varð útsettur av praktiskum orsøkum.

Á fundinum hesaferð snýr skráin seg fyri ein stóran part um val av limum í nevndir, ráð og stýri.

Tað eru Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin, sum hava gjørt avtalu um samstarv fyri næstu árini, og Steinbjørn O. Jacobsen heldur fram sum borgarstjóri.

Jákup Mikkelsen er varaborgarstjóri, og meirilutin ætlar at bjóða minnilutan annan varaborgarstjóran.

Skráin fyri býráðsfundin verður løgd á heimasíðuna hjá Klaksvíkar kommunu áðrenn fundin.

# Nú kókar á Listasavninum

**Formaðurin í stýrinum fyri Listasavnið vil hava eitt umboð í stýrinum at siga seg frá, tí tagnarskyldan er brotin, og hann vil hava alt málið um nýggjan leiðara at ganga umaftur**

LISTASTRÍÐ

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Stríðið, sum seinastu vikurnar hevur verið millum limirnir í stýrinum fyri Listasavn Føroya, stendur nú í ljósum loga.

Hóskvøldið helt ein meiriluti í stýrinum fast við, at Helgi Fossádal skuldi setast í starvið sum leiðari fyri Listasavn Føroya, men tað gingu bara nakrir tímar, so var formaðurin í stýrinum klárur við eini hvassorðaðari fráboðan.

Í hesi fráboðan rør formaðurin fram undir, at tagnarskyldan í stýrinum er brotin, at ein stýrislimur skal siga seg úr stýrinum, og at alt málið skal ganga umaftur.

Landsstýrismaðurin við mentamálum, sum hevur fingið tvær áheitanir um at leggja upp í málið, vil ikki nerta málið, tí hann heldur, at talan er um ein sjálvsognarstovn við einum stýri, sum landsstýrismaðurin ikki skal taka avgerðir fyri.

### Meirilutin og formaðurin

Fimm fundir hava verið hildnir um setanina av nýggjum leiðara fyri Listasavn Føroya, men støðan hevur alla tíðina verið tann sama. Eini meirluti á tríggjar limir hevur viljað sett Helga Fossádal í starvið, meðan formaðurin hevur verið ímóti hesum, tí hann heldur, at Helgi Fossádal ikki lýkur treytirnar í lýsingini eftir leiðara.

Formaðurin í stýrinum, Gunnar Hoydal, vil hava ein listfrøðing við útbúgving í leiðarastarvið, men hann hevur staðið einsamallur við hesi hugsan, tí bæði innstillingarnar og meirilutin í stýrinum hava vilja havt Helga Fossádal í starvið, hóast hann ikki hevur listfrøðisliga útbúgving.

Viðtøkurnar fyri Listasavnið siga greitt, at tað er stýrið fyri savnið, sum setir leiðaran. Og avgerðir í stýrinum verða tiknar við vanligum meiriluta. Men hóast hetta hevur formaðurin í stýrinum ikki vilja boygt seg, tí hann heldur, at krøvini í lýsingini og nú almenni starvssetanarpolitikkurin hava størri týdning.



*Formaðurin í stýrinum fyri Listasavn Føroya er nú í opnum stríði við meirilutan í stýrinum. Formaðurin vil hava ein lim í stýrinum at siga seg frá, tí tagnarskyldan er brotin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Alt skal ganga umaftur

Eftir at Útvarpið fríggjakvøldið boðaði frá, at nú var leiðarin fyri Listasavn Føroya settur, og hann verður Helgi Fossádal, samstundis sum listfrøðingurin á savninum, Inger Smærup Sørnsen, heldur fram í sínum starvi.

Hetta fekk formannin í stýrinum at ressast, og hann sendi stutt aftan á eina fráboðan til fjølmiðlarnar, har hann kravdi, at alt málið gekk umaftur.

– Eitt høvuðskrav er, at allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Men longu morgunin eftir fyrsta fundin í setanarnevndini, sum í hesum føri er stýrið sjálvt, varð trúnaðarskyldan brotin og tíðindi borin í fjølmiðlunum, hvat var farið fram á fundinum, staðfestir formaðurin millum annað í fráboðanini.

– Eitt annað týðandi krav er, at avgerðin ikki skal kunngerast alment, fyrr enn allir umsøkjarar hava fingið boð um avgerðina. Men aftur hesa ferð hendi tað: Dagin eftir fundin, og áðrenn tíð hevði verið at skriva umsøkjarunum bræv, varð málið viðgjørt alment í útvarpi og sjónvarpi, í hesum føri enntá við navninum á tí, sum hevði sagt frá, hvat var hent á fundinum.

– Eg kann sum formaður í stýrinum, umboðandi Mentamálaráðið, undir ongum umstøðum vera við til eitt so opið brot á grundreglurnar í málsviðgerðini. Eg fari tí at krevja, at tann, ið hevur brotið trúnaðin, sigur seg úr setanarnevndini, og at nýggj vigerð fer fram av øllum málinum, sigur Gunnar Hoydal.

# Televarpið bíðar við Suðuroynni

**Vágarnar, Sundalagið og Kvívík standa fyrst fyri í útbyggingunum hjá Televarpinum, og áðrenn nakað hendir í Suðuroy, skulu fleiri kanningar gerast**

TELEVARPIÐ

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Útbyggingarnar av netinum hjá Televarpinum halda fram, og í hesum árinum ætlar Televarpið sær fyrst og fremst at arbeiða við at fáa Vágarnar, Sundalagið og Kvívík upp í sítt net.

Ikki fyrr enn tað er gjørt, kemur Suðuroyggin inn í myndina.

Menningarstjórin hjá Føroya Tele, Tróndur Djurhuus, nevndi á fundi í Suðuroynni í farnu viku møguleikarnar fyri, at Televarpið bygdi út í Suðuroy.



*– Vit fáa nýggjar kundar á teimum nýggju støðunum, sum vit byggja út, men vit kunnu eisini fegnast um, at vit fáa støðugt fleiri kundar á teimum støðunum, sum vit hava verið í longri tíð, sigur Laila Hentze, stjóri í Televarpinum*

Men sambært stjóranum Televarpinum er ikki ítøkiligar ætlanir um hetta enn.

– Vit hava gjørt eina ætlan fyri, hvussu vit fara at byggja út, og hesa ætlan halda vit okkum til, sigur Laila Hentze.

– Vit fara sjálvandi at kanna møguleikarnar fyri at fara til Suðuroyar eisini, men áðrenn vit kunnu siga nakað um tað, mugu vit gera tær somu kanningarnar har, sum vit hava gjørt alla aðrastaðni, sigur Laila Hentze.

Tað er tí ikki sannlíkt, at Televarpið verður at síggja í Suðuroynni í bræði.

### Kundaskarin veksur

Televarpið hevur fleiri enn 4000 kundar í síni skipan, og talið á kundum veksur støðugt.

– Vit fáa nýggjar kundar á teimum nýggju støðunum, sum vit byggja út, men vit kunnu eisini fegnast um, at vit fáa støðugt fleiri kundar á teimum støðunum, sum vit hava verið í longri tíð, sigur Laila Hentze.

P/F Televarpið var stovnað í juli mánaði 2003 og fór at senda í desember mánaði sama á. Føroya Tele er einasti partaeigarin í Televarpinum.

P/f Televarpið er eitt sølu- og útbreiðslufelag við egnari tele-konsession frá Vinnumálaráðnum. Televarpið sendir útlendskar sjónvarpsrásir á sínum egna netið, umframt at Televarpið eisini hevur sína egnu rás.

Í nevndini sita Andras Róin, formaður, Heini Joensen og Reidar Nónfjall.